Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Birita Matras Petersen, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Limaskapur í European Higher Education Area (EHEA) og Erasmus+

Spurningar:

1. Hvørji stig eru framd í arbeiðinum við føroyskum limaskapi í EHEA og Erasmus+?
2. Hvat er eftir at gera til tess at fáa fullan limaskap í EHEA og Erasmus+?

Viðmerkingar:
Hóast tøl hjá Studna staðfesta, at talið av lesandi undir hægri útbúgving í Føroyum er hækkað seinastu tíggju árini, vísa tøl hjá Hagstovuni, at á leið 40 prosent í hvørjum árgangi flytur av landinum, tá tey eru í tjúguárunum. Við støði í nýggjari kanning hjá Hægri Námi á Glasi eru eisini greiðar ábendingar um, at ein stórur partur av ungdóminum ynskir at fara undir útbúgving í øðrum londum. Sambært somu kanning er serliga Danmark landið, ið dregur føroyska ungdómin at sær. Sostatt kann sigast, at Føroyar eru í kapping við umheimin, tá tað ræður um útbúgving.

Gongd er í arbeiðinum við einum kampus til Fróðskaparsetur Føroya, ið er eitt fet á leiðini at skapa eitt dragandi og livandi lestrarumhvørvi í Føroyum. Í strategiætlanini fram til 2030 hjá Fróðskaparsetrinum verður víst á, at Føroyar skulu gerast limir í European Higher Education Area (EHEA) og Erasmus+. Yvirskipaða endamálið við limaskapinum er at gerast partur av einum størri evropeiskum útbúgvingarøki og samstarvi, umframt at tryggja altjóða flytføri hjá lesandi, granskarum og undirvísarum á Fróðskaparsetrinum.

Í longri tíð hevur politiska skipanin arbeitt fram ímóti, at Føroyar skulu gerast partur av EHEA. Harafturat hava lestrarfeløgini Meginfelag Føroyskra Studenta og Ráð Teirra Lesandi á Fróðskaparsetrinum miðvíst virkað fyri, at Føroyar skulu gerast partur av Bolognaavtaluni og EHEA.

Við føroysku útbúgvingarstovnunum hava ung og onnur møguleika at nema sær útbúgving, ið er kjølfest í føroyskum viðurskiftum. Við limaskapi í EHEA og Erasmus+ fáa føroysk lesandi fleiri møguleikar, eitt nú at taka ein part av útbúgvingini í øðrum londum. Til tess at fáa fullan limaskap í EHEA og Erasmus+ skulu Føroyar lúka ávís krøv. Enn eru vit ikki komin á mál við hesum arbeiðinum, og tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 26. november 2024

Birita Matras Petersen